# Minningarhald í Klaksvík

**Dagur teirra sjólátnu vakti nógv persónlig minni hjá Levi Joensen, sum helt røðu á minningarhaldinum í Klaksvík í gjár**

MINNINGARHALD

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í vøkrum nýggjum hami er gamli kirkjugarður í Klaksvík vorðin um nakað ein enn virðiligari minnislund fyri teir mongu sjómenn úr Klaksvík og Norðoyggjum, sum hava latið lív á sjónum gjøgnum tíðirnar.

Til minningarhaldið í gjár setti KFUM & K Kórið sín dám á løtuna, áðrenn Levi Joensen helt røðu, og kransar síðani vórðu lagdir við Minnisvarðan.



*Fimm kransar vórðu lagdir við Minnisvarðan í gamla kirkjugarði í Klaksvík á Minningardegi teirra sjólátnu í gjár. Kransarnir vórðu vegna Klaksvíkar Býráð, Føroya Landsstýri, Klaksvíkar Útróðrarfelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag*



*Frá innvígslu fyrst í fimtiárunum av minnissteinum yvir skip og bátar úr Norðoyggjum, sum fórust undir krígnum. Menninir, sum standa við steinarnar, eru skipsfelagar hjá teimum, sum fórust*

## Tungar løtur

Stóra fjøldin, sum var savnað við gamla kirkjugarð í gjár, minti á, at eisini Klaksvíkin hevur verið sera hart rakt av syndarligum lagnum á havinum bæði í friðar- og í krígstíðum.

Mong av teimum, sum vóru til staðar, mundu kenna seg aftur í persónligu minnunum hjá røðaranum Levi Joensen. Levi minti á, at umstøðurnar og samskiftismøguleikarnir hjá teimum, sum baldust á sjónum fyrr sjáldan, vóru av teimum bestu. Tess størri var gleðin kanska, tá teir komu aftur í øllum góðu. Men sorgin, tá ikki tað ikki berast boð í bý, verður altíð líka stór.

Levi mintist tunga huglagið og spakuliga tosið millum menn á keiini, tá bíðað varð eftir báti ella skipi, ið átti at havt verið aftur. Og sjálvur var hann ofta við, tá farið var at leita. Enn mintist hann køldu kensluna, tá ein stampur ella annað varð funnið, og menn vóru greiðir yvir, hvaðani tað stavaði, og hvat tað merkti.

Deyðin á sjónum hevur onkursvegna altíð verið ein patur av lívinum á landi. Tað verði seg um bátar gingu burtur, fingu skaðasjógv, rendu á land ella gjørdust offur fyri vandasiglingini undir krígnum. Av teimum 219, sum lótu lív á sjónum undir krígnum, átti Klaksvíkin eisini sín part. Teir fyrstu av minningasteinunum yvir hesi skip vórðu reistir fyrst í 1950unum. Hóast nógvir sorgarleikir liggja aftanfyri hvørt einasta skipanavn, minna tey kortini á, at menn ongatíð mistu vónina og ganga nógv av nøvnunum aftur í nútíðar skipaflotanum.

Eftir røðuna vórðu fimm kransar lagdir við minnisvarðan, áðrenn løtan endaði við kórsangi og felagssangi.



*Mong mundu kenna seg aftur í persónligu minnunum hjá Levi Joensen í røðuni til Minningarhald teirra sjólátnu í Klaksvík í gjár*



*Bjørn Kalsø, fiskimálaráðharri, legði krans við Minnisvarðan vegna Føroya Landsstýri*

An international study programme in Denmark is only a click away!

See www.academy.ats.dk for starting dates and further information

- Multimedia Design and Communication
- Building Technician
- IT and Electronics Engineer
- Chemical and Biotechnical Science

Programmes are offered both in English and Danish

Academy of Professional Higher Education
Aarhus Technical College
Denmark